Norðragøta 27. september 2022

**Reglugerð fyri Húsini hjá Karli í Norðragøtu**

1) Húsini hjá Karli er ogn hjá Eysturkommunu, matrikulnummar 28e í Norðragøtu.
2) Endamálið við Húsunum hjá Karli er at vera karmur um nútíðar list og skapandi virksemi.
3) Sambært býráðssamtykt skulu Húsini hjá Karli nýtast til listafólkabústað, framsýningarhøli og listaverkstað.
4) Ein 5-mannanevnd umsitur virksemið í húsunum sambært endamáli hússins og ger reglur fyri listafólkabústað, framsýningar, listaverkstað og aðra nýtslu av húsunum.
   Meðan húsini verða útleigað til listafólk, kann vanligt virksemi fara fram serliga í kjallarahæddini og í verkstaðnum. Hetta kann t.d. snúgva seg um kvøldskúlavirksemi og framsýningar.
5) Nevndin fyri Húsunum hjá Karli er:
   3 limir sum býráðið velur; 1 embætisfólk og 2 býráðslimir, sum verða vald fyri hvørja býráðssetu. 2 limir, sum áhugafelagið *Hjá Karli* velur. Hesir 2 limir verða valdir árliga á aðalfundi hjá áhugafelagnum.
6) Húsini skulu, sambært reglunum, latast í sama standi sum tá tey vóru útleigað.